**MUNUR Á RÚSDREKKA**

*Christian Anreasen, FSF-forseti, staðfestir greitt, at Smirnoff er ólógligt hjá einum leikara at hava á rygginum – við Okkara er hann ikki so avgjørdur*



# Ivi um Okkara sponsorat av HB

## - Vísir tað seg, at sponsoravtalan millum HB og Okkara Bryggjarí stríðir ímóti Stevnumiðum um Rúsdrekka og Ítrótt hjá ÍSF, so mugu vit taka málið upp, sigur Christian Andreasen, FSF-forseti

Leo Poulsen

HB hevur í mong ár havt eina sponsoravtalu við Føroya Bjór, stóra bryggjarínum í Føroyum. Og tað er hent uttan at nakar hevur átalað HB fyri at gera sponsoravtalur, sum stríða ímóti Stevnumiðum um Rúsdrekka og Ítrótt, sum stjórnin í ÍSF samtykti 14. mai 1999.

– Eg minnist kjakið tá. Argumentið tá var, at Føroya Bjór fyri mong er minst líka kent fyri sítt sodavatn sum tað er fyri øl, sigur Heðin Mortensen, fyrrverandi ÍSF-forseti.

Men Okkara hevur onga slíka framleiðslu, so vit hava spurt Christian Andreasen, FSF-forseta, hvussu eitt sponsoravtala millum HB og Okkara Bryggjarí samsvarar við Stevnumið um Rúsdrekka og Ítrótt hjá ÍSF.

– Nú kenni eg ikki innihaldið av einari avtalu millum HB og Okkara Bryggjarí, og hetta er heldur ikki nakað, vit hava umrøtt í Fótbóltssambandinum. Tað er soleiðis, at tað fyriliggur ein samtykt hjá ÍSF frá 99 sum sigur, at tað er ikki loyvt ítróttafólki at bera lýsingar frá virkjum og feløgum, sum lýsa við rúsamdi evnum, sigur Christian Andreasen.

Hann hevur sum nevnt ongan kunnleika, hvørjar lýsingar leikararnir hjá HB beram ótvegis almenninginum, og tí hevur hann ikki nakrar viðmerkingar til júst tað.

– Men sum nevnt hava vit ikki havt hetta stevnumiðið til viðgerðar í Fótbóltssambandinum nýliga, og eg fái ikki sagt upp á standandi fót, hvørji boð vit hava givið út til limir okkara hesum viðvíkjandi, men samtyktirnar hjá ÍSF eru galdandi fyri okkara limir eisini, sigur Christian Andreasen.

### Ikki Smirnoff – kanska Okkra

Men tá HB velur at gera ein sponsorsáttmála við Okkara, skuldi tann boðskapurin ikki verið til at misskilt.

– Um tað er soleiðis, at feløg brúka lýsingar frá virkjum, sum lýsa við rúsandi evnum, so er tað í stríð við viðtøkurnar frá 99, men eg veit ikki, hvat fyri lýsingar, teir ætla sær at brúka, og hvønn boðskap teir ætla at bera í lýsingunum. Tað er trupult hjá mær at gera viðmerkingar til eitt mál, ið eg ikki kenni til fulnar, sigur Christian Andreasen.

Dømi um, hvussu lýsingarnar koma at síggja út, hava staðið á heimasíðuni hjá HB, men til fyrsta landskappingardystin hjá felagnum í Runavík farna vikuskiftið, var lýsingin ikki komin á HB-troyggjurnar.

– Hetta er eitt øki, har púra greiðar reglur áttu at verið, sum blivu kommunikeraðar út til feløgini, men sum sagt er ikki loyvt ítróttafólki at lýsa við rúsandi evnum, herundir rúsdrekka. Men um eitt navn á einari fyritøku kann knýtast til rúsani evni, er eitt torgreitt mál, sum eg ikki fái svarað upp á her og nú, sigur Christian Andreasen.

Men FSF-forsetin vil ikki sammeta eitt nú Smirnoff við Okkara.

– Um ein leikari kemur á vøllin við Smirnoff á rygginum, so er tað í stríð við samtyktina hjá ÍSF, sigur Christian Andreasen.

Men hví er hann ikki so alvísur, tá tað kemur til Okkara?

- Sum eg segði, so ber illa til hjá mær at úttala meg um eina avtalu millum HB og Okkara, sum eg ikki havi sæð, og ikki veit hvat gongur út upp á. Eg veit heldur ikki um og hvørjar aðrar framleiðslur Okkara hevur. Tá eg veit tað, ma eg viðgera tað harfrá, saman við fólkunum í FSF, og so mugu vit taka eina avgerð út frá tí, sigur Christian Andreasen, FSF-forseti.

## Bryggja alkoholfría øl

Leo Poulsen

**Formaðurin í Havnar Fótbóltur veit væl um reglurnar hjá ÍSF um rusdrekka og ítrótt.**

**Jú, tær eri eg vitandi um, og nei, eg haldi ikki, at sáttmálin er í stríð við reglurnar, sigur Jan Otto S. Holm.**

**Hann vísir á, at HB í fleiri ár hevur havt stuðulssáttmála við Føroya Bjór, sum jú eisini bryggjar øl. Settur upp móti, at argumentið í tí sambandi var, at Føroya Bjór eisini bryggjar sodavatn, sigur Jan Otto S. Holm:**

**Okkara bryggjar eisini eina lættøl uttan alkohol.**

**Meira vil formaðurin í Havnar Fótbóltur ikki siga um evnið.**



*Jan Otto S. Holm.*